Anna Elisabeth og Andreas í Dali:

Forfedrar til okkara fremstu undangongufólk

Ættin hjá Elsu og Dímunar Jóannes er ein stór og áhugaverd ætt, sum fleiri ferðir er umrødd her í blaðnum og eisini í teiginum Hendur ið Sleptu. Ættin er nevnliga væl umboðað í gamla kirkjugarði í Havn. Ein dóttir tey bæði var Anna Elisabeth, sum giftist við Andrias Andreassen í Havn, vanliga kallaður skraddarin í Dali. Teirra ætt fara vit at umrøða í hesum partinum

Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Skraddarin í Dali kom 16 ára gamal til Havnar úr Norðradali. Pápi hansara, Andreas Poulsen, var upprunaliga traðarmaður í Kaldbak. Pápi Andreas, Páll á Gili, (Poul Olesen), kom úr Syðrugøtu. Hann var fátækur maður, átti hálva kúgv og hálvan bát, men væl stóð hann seg. Hann dugdi væl at lesa og skriva, og hann lærdi børnini í Kaldbak hendan kunst. Hetta sigur, at maðurin hevur verið nakað útyvir tað vanliga. Konan var Anna Andrassdóttir.

Í 1807 flutti Andreas Poulsen til Norðradals sum uppsitari á prestagarðinum og var har til 1828, tá ið hann flytir til Havnar.

Systir hansara Anna var gift við bóndanum á Torvlagnum í Kaldbak. Foreldrini hjá Andreas fóru til dóttrina Onnu at búgva. Húsini hjá teimum í Kaldbak blivu tískil tóm. Andreas Poulsen flutti hesi húsini til Havnar og setti tey yviri á Kák.

Grundina fekk hann frá Sámali, sonur Hovs Dánjal. Hesin hevði fingið Kákið frá amtmanninum. Har ið húsini stóðu, kallaðist Yviri í Dali. Andreas Poulsen varð tískil kallaður Gamli Andrass í Dali.

Pápin fær eina trøð, Dalatrøðin, og Andreas fer at arbeiða á prestagarðinum. Her lærir Andreas at seyma, og hetta gerst hansara lívsstarv, sum hann enn er kendur fyri.

Anna Elisabeth og Andreas, skraddarin, giftust tískil inn.

Trý húsanøvn vóru "í Dali" í Havn:

Uppi í Dali kom úr Syðradali, var í Krókabrekkuni.

Yviri í Dali kom úr Norðadali, á Kák, var við Skansabrekkuna.

Í Dali komi úr Norðadali, var í Gongini, har Sjóvinnubankin var.

Í 1939 var garður gjørdur um húsini í Yviri í Dali. Tá ið grivið var út fyri stólpum til portrið, var komið niður á mannabein. Hetta váttar søgurnar um, at her hevur verið avrættingarstaður.

Ættin

Skraddarin í Dali giftist tvær ferðir. Fyrra gifta var við Elsebeth Helenu Jacobsdatter av Selatrað. Hon doyði í barsilssong í 1853. Við henni fekk hann dóttrina Charlottu. Charlotta giftist við Petur Hans Sørensen, ættaður úr Søldarfirði. Tey bæði, saman við dótrini Elspa Lena, eru eisini jarðað í gamla kirkjugarði. Vit fara at greiða frá teimum seinni í hesi rød.

Skraddarin giftist aftur við Onnu Elisabeth Johannesdatter (1835-1906) úr Skopun, dóttir Dímunar Jóannes. Tey fingu átta børn. Tey vóru:

1. Andreas Helenius Andreassen, f. 1857. Hann giftist við Elsu Debes f. 1853, sum var dóttir Wenselaus Debes, vanliga kallaður Dreygarin. Elsa var kend fyri at vera sera virkin í losjuni í Havn.

Ein sonur teirra var Nyholm Debes, sum var kendur sum yrkjari og eisini sum løgtingsmaður.

2. Jens í Dali, føddur í 1860, og sum giftist við Mariu Dam, hava vit umrøtt.

3. Elsa Frederikka 1862 – 1873.

4. Johanna (1864-1952) giftist fyrru ferð við Christian Paula Ziska (1858-1895). Hann var lærari úr Klaksvík. Seinnu ferð giftist hon við Marius Jensen beiggja Sandoyar Andreas, giftur við Tominu.

Í fyrru giftini vóru fýra børn. Eitt av teimum var Maria Ziska (1885-1952), sum giftist við Hanus Kamban. Listarmaðurin Janus Kamban, sum nú um dagar fylti 95 ár, er sonur teirra. Ein sonur, Kristoffur, doyði 16 ára gamal í 1933. Hann hevur verið umrøddur á hesi rød. So ungur hann var, var hann longu blaðstjóri á næmingablaðnum Glámlýsi, sum náddi at koma út við trimum bløðum, áðrenn blaðstjórin doyði av sjúku. Tað kann vera nevnt, at hesi Kristoffur var uppkallaður eftir mammubeiggjanum Kristoffur Ziska, sum gekk burtur við Pola í Dali við Oliviu í 1912.

Í seinnu giftu fekk Johanna sonin Bethuel Jensen, kendur sum prentari.

5. Anna Margretha (1866-1941). Hon var gift við Sigmund Arge, sum var ein av okkara fremstu smiðjumonnum. Tey eru eisini umrødd í hesi rød saman við teirra einasta soni Andreas, sum druknaði bert 24 ára gamal. Tey áttu átta døtur. Ein tann kendasta var Olivia, Liffa, ein av okkara fyrstu og fremstu kvinnusakskemparum.

6. Napoleon í Dali (1868-1912). Hann giftist við donsku Oliviu Frandsen.

Skræddarin Andreas Andreasen

ANDREAS ANDREASEN
Í DALI
F. 16. OKTOBER 1812
D. 21. JANUAR 1895

Her eru trý ættarlið. Uttast til høgru er Anna Elisabeth, kona skraddaran Andreas. Nr 2 f.v. er Jóhanna Ziska. Síðan eru tað børn hennara f.v. : Maria Ziska, seinni Kamban, Christoffur Ziska, sjólætst við Oliviu í 1912, og Andrias J Ziska, giftist við Onnu hjá Djóna í Geil

Napoleon var ein av okkara fremstu slóðarum bæði á landi og sjógvi. Hann var umrøddur í hesi rød saman við 16 ára gamla Kristoffur í blaði nr. 167/2007. Napoleon fekk eina váta grøv, men fleiri av hansara børnum eru grivin í gamla kirkjugarði. Tey eru Napoleon Oliver f. 1900, Arne Eli Linder f. 1902 og Olivia f. 1905. Húsini hjá Pola, Arnesminde í Bringsnagøtu, eru uppkallað eftir Arna. Skip hansara Olivia er helst uppkallað eftir dóttrini.

Í samband við umrøðuna av Onnu Margrethu og Georg Lindenskov í hesi rød høvdu vit eina frásøgn um barslið hjá abbasoni teirri Georg, kendur frá Dimmalætting.

Ein heldur óvæntaður gestur var Poli í Dali. Beate, mamma Georg, og Poli vóru systkinabørn.

Men samstundis var Poli ein av teimum fyrstu og fremstu í Brøðrasamkomuni. Sjálvt í dag, nærum 100 ár seinni, ganga "baptistar" treyðugt til hendingar sum barnadóp og konfirmatión. Tað má hava verið upp aftur meira óvanligt tá. Poli man hava verið sera tolerantur á hesum økinum.

Kona Pola flutti so til New Zealand við teimum flestu av børnum. Ein dóttir teirra, sum hevur havt samband við ættina í Føroyum, var Vilborg. Hon er deyð fyri kortum meira enn 95 ára gomul. Tískil er tað ivasamt um nakað samband er tann vegin í dag.

7. Thomina (Mina) 1870, sum giftist við Sandoyar Andreasi. Umrødd í næstseinasta parti.

8. Elsa Frederikka 1873 – 1895. Doyði í Nørre Sundby.

Anna Elisabeth átti seks systkin: Janus, Anna Margretha, Frederikka, Klæmint og Jóan Jakku. Vit hava umrøtt ættina hjá fimm teirra og kann stutt sigast um tey:

Janus var abbi tann 102 ára gamla Óskar Jensen í Íslandi. Klæmint var abbi Dortheu, sum flutti til Canada og giftist við Sigurd í Puntabyrgi. Inga var omma Napoleon Isaksen, sum búsettist í Ongland. Anna Margretha giftist við Georg Lindenskov.

Keldur:
Eyðfinn Sondum
Hanus Kamban
FF-blaðið

Næstu ferð:
Komandi partur verður um Thoru Pállson, fyrstu lærarinnu á Tvøroyri

Húsini í Dali eru tey uttast t.v. Skansabrekkan gongur niðan frá húsunum